# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Alt komið uppá pláss:

# Seta á Brugduna í kvøld



Her liggur Stena Don á Brugdumiðinum, sum eisini er kend svartklalvaleið á Suðuroyarbankanum. Hvat man skiparasonurin tonkja uppá, olju ella svartkalva? Kanska hann ynskir bæði... Myndin er tikin umborð á Steintór



Stena Don tíðliga mánamorgunin, áðrenn hann legði leiðina til havs aftur

Mynd Árni Joensen

TÍÐINDASKRIV

Jarðfeingi gav í gjár Statoil, sum fyristøðufelag í loyvi 006, góðkenning at fara undir leitiboring á landgrunninum.

Pallurin Stena Don, sum skal bora brunnin hjá Statoil samtakinum, byrjar at bora í kvøld.

Statoil samtakið hevur loyvi nummar 006, ið fevnir um eitt øki, sum liggur á basaltøkinum í ein landssynning úr Føroyum. Brunnurin verður boraður á Brugdan-leitimiðnum á 61° 16' 42.56"N og 04° 55'59.96" V. Havdýpið á staðnum er 478 metrar.

Boringin er mett at taka út við 3 mánaðir.

Statoil er fyristøðufelag í samtakinum, ið umframt Statoil fevnir um DONG, Anadarko, Enterprise Oil (Shell), Amerada Hess, BG Group, Føroya Kolvetni og Atlantic Petroleum.

Avtala um brunnin kom í lag í heyst, tá landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, skrivaði undir avtalu um at flyta boriskyldurnar frá loyvi 001 og loyvi 003 til ein leitibrunn í loyvi 006.

Umframt boringina í summar verður ein brunnur boraður næsta summar í loyvi 007 og ein í loyvi 005 í 2008. Boringarnar eru antin partur av arbeiðsskyldunum frá fyrsta loyvisumfari ella avtalaðar sum úrslit av tí arbeiði, ið er gjørt í sambandi við fyrsta umfar.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at tað er ein spennandi boring, sum nú byrjar. "Eg vóni, at rakt verður við kolvetni, men vit mugu samstundis minnast til, at hetta er ein váðin boring og tann fyrsta av sínum slag gjøgnum tjúkkar basaltfláir. Boringin fer at geva okkum nýggja vitan um jarðfrøðina undir basaltinum, og hendan vitan fer at verða ein týdningarmikil liður í framtíðar oljuleiting á landgrunninum."

